# Skip fingið munnligt loyvi at fiska makrel

**MAKRELUR** Nógv hevur verið kjakast um makrel í hesum árinum, bæði vinnuliga og politiskt, men nú skilst, at landsstýrismaðurin hevur givið nøkrum skipum munnligt loyvi at fara á makrelveiði.

Vilmund Jacobsen




*Finnur Fríði og Jupiter eru farnir at fiska makrel – og ivaleyst eru onnur skip eisini farin til fiskiskap eftir makreli undir Føroyuma*

Hóast politiska skipanin í Føroyum enn ikki er vorðin samd um, hvussu fram skal farast í spurninginum um makrelin í 2010, nú samráðingarnar um býtið millum standalondini slitnaðu í Londan fyrr í summar, er kortini líkt til, at ein ávís loysn er fingið á teimum sløku 4.000 tonsum av makreli, sum lógu eftir av føroysku kvotuni fyri 2009.

Tað eydnaðist tíverri ikki at fáa fatur á landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Jacobi Vestergaard, í morgun, men Sosialurin veit rættiliga vist, at landsstýrismaðurin um dagarnar hevur givið feløgum munnlit loyvi at fara út at fiska makrel.

Jacob Vestergaard hevur verið eitt sindur trekur í seinastuni, og reiðaríir hava funnist at, at landsstýrismaðurin ikki hevur viljað skrivað út loyvi at veiða tann partin av eginkvotuni hjá skipum, sum lá eftir frá árinum 2009.

Í fjør heyst søgdu bæði Noreg og ES, at tey fóru at loyva sínum skipum at fiska tað, sum lá eftir frá í fjør, í 2010 í staðin.

Sløk 4.000 tons av føroysku makrelkvotuni í fjør vórðu ikki veidd og føroysk reiðaríir, sum áttu lut í hesi kvotu, hava funnist hvassliga at tí hann hevur drálað við at geva teimum loyvi at fiska hesa nøgd.

Men um dagarnar hava so reiðaríir fingið at vita munnliga frá landsstýrismanninum, at tey kunnu loysa og fara út at fiska makrel.

Lítið man vera at ivast í, at tað eru hesi sløku 4.000 tonsini, sum skipini nú í fyrsta lagi kunnu fara eftir.

Herfyri frættist, at Finnur Fríði og Jupiter høvdu loyst, og síðan tá eru ivaleyst eisini onnur skip fara út at veiða makrel í føroyskum sjógvi.

Sosialurin fer at venda aftur til hetta mál í blaðnum fríggjadagin.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Slakari gulllaksaveiða

**VEIÐA** Seinastu tíðina er minni gulllaksur komin upp á land, enn tá veiðan var best í byrjanini av hesi vertíðini

Vilmund Jacobsen



*Tey seks skipini, sum eru á gulllaksaveiði í hesi vertíðini, eru Polarhav og Stjørnan, Vestmenningur og Fram og Vesturbúgvin og Steintór*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Veiðan hjá teimum seks skipunum, sum hava gulllaksaloyvi, hevur í seinastuni verið heldur slakari, enn tá vertíðin byrjaði tíðliga í apríl, og skipini ta fyrstu tíðina høvdu rættiliga rokveiði.

Í byrjanini av vertíðini gjørdu skipini einar tveir góðar túrar um vikuna, har tey vóru full undir lúkurnar.

Gulllaksaveiðan hevur ikki verið vánalig, men hevur verið heldur slakari seinastu vikurnar enn annars.

Einki óvanligt er í, at veiðan er eitt sindur aftur og fram gjøgnum vertíðina, men sum oftast plagar hon at batna aftur, tá tíð er umliðin.

Á landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará, sum vanliga landar gulllaksaskipini, Polarhav og Stjørnuna, søgdu tey herfyri, at meðan tað í byrjanini av vertíðini tók einar 3-4 dagar at fylla skipini, tekur tað nú kanska 4-5 dagar at fáa somu nøgd – ella eitt samdøgur meiri.

Tað er tó ikki so, at skipini, sum eru á hesi veiði, sigla við hálvari last aftur av túri. Tey hava gjarna fingið uppí, tá tey hava verið úti hesar 4-5 dagarnar.

### Breyt motor

Tey seks skipini, sum plaga at fiska gulllaks í vertíðini, eru Polarhav og Stjørnan, Vestmenningur og Fram og Eysturbúgvin og Vesturbúgvin.

Men fyri eini tíð síðan vóru teir so óhepnir á Eysturbúgvanum, at motorurin fór í knús, meðan teir vóru til fiskiskap. Neyðugt er við nýggjum motori, og væntandi var, at hetta fór at taka einar tveir mánaðir ella so.

Og soleiðis reyk allur tann størri helmingurin av gulllaksavertíðini hjá Eysturbúgvanum í hesum umfari.

Vesturbúgvin hevur seinastu tíðina partrolað eftir gulllaksi saman við djúpvatnstrolaranum Steintóri úr Hvalba.

Skipini hava gjørt nakrar túrar, og sum skilst hevur hetta riggað hampiliga væl, tó ikki heilt so væl, sum tá Eysturbúgvin og Vesturbúgvin fiskaðu saman.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Miðlar

Dorit Hansen
*dorithansen4@gmail.com*



## Danskar spegilsmyndir

Hansara hátign Heindrikkur prinsur burdi verið útnevndur heiðursføroyingur. Meðan miðlarnir tuskaðu aftaná distanseraðu drotningini, sjarmeraði gamli prinsurin bæði eldri konur og líltar smádreingir. Og á seinasta tíðindafundinum átti prinsurin eisini allar tær góðu viðmerkingarnar: Hevur tað verið ein góður túrur? Veðrið kundi verið betri. Var tað ikki fantastiskt at hoyra grottutónleik? Tað hevði riggað betri við lúraljóði. Hvat heldur tú um føroyingar? Teir eru ikki líka tilafturskomnir, sum tá eg var her fyrstu ferð. Og maturin? Jú, hesu ferð smakkaði hann í øllum førum betri enn seinast.

Onkur útlenskur journalistur hevði spurt eitt føroyskt barn, hvat ein drotning er, og fekk svarið: ein kona sum bestemmar. Drotningin hevði onga viðmerking til hetta, og hvat skal hon siga: Nei, eg havi einki vald, eg eri bara ein spegil, sum tit kunnu spegla tykkum í? Sum spegling var vitjanin væl eydnað. Sjónvarpið sendi samandrátt hvørt kvøld, og vit sóu okkum sjálv, soleiðis sum vit síggja út í gylta drotningaspegilinum. Um hennara hátign ikki kom, høvdu vit ikki fingið høvi at sæð søguna í Vestmanna, merkt brimið í Mykinesi ella hoyrt sjósálmin í Skúvoy (har drotningin ikki kom, men tað hevði minni týdning, tí tað er spegilsmyndin sum er avgerandi).

Áðurnevndi journalistur var í veruleikanum ikki útlendskur. Hon var donsk, og hon skilti ikki, at føroyingar tosaðu um donsk tíðindafólk sum útlendsk. Nei, tað er kanska ikki lætt at skilja. Um norðmenn hyggja mest eftir norskum sjónvarpið, týskarar eftir týskum sjónvarpið og bretar eftir bretskum, eru føroyingar so danskir, tí vit hyggja mest eftir donskum sjónvarpi? DR2 hevði fleiri góðar sendingar farnu vikuna, millum annað eina amerikanska sendirøð (við danskari talu og donskum teksti), Inside the Great Magazines, um at vit heldur vilja lesa søgur um Madonnu (og Margrethu?) enn um kríggj og ræðuleikar.

Vit eru eisini donsk, tá vit hyggja at føroyskum sjónvarpið, tí har verða somu sendingar endursendar – uttan nakra føroyska týðing. Hetta er neyvan gott fyri tjóðskapin ella demokratiið, men tað er ikki lætt hjá lítla Kvf at kappast við journalistisku dygdina hjá t.d. TV2, sum sunnukvøldið varpaði ljós á donsku heimahjálpina. 14-daga kanningararbeiði hjá tveimum journalistum og einum myndamanni avdúkaði, at heimahjálparar brúktu upp til helvtina av arbeiðsdegnum heima hjá sær sjálvum ella í privatum handilsørindum. Loyniligt kamera fylgdi ávísum heimahjálparum, og bæði heimahjálp og myndugleikar máttu standa til svars.

Tíbetur fáa slíkar óhepnar síður av veruleikanum frið í Føroyum. Føroyskir miðlar hava ikki pengar ella umstøður at vera veruligir vakthundar, og hevði ein danskur miðil dittað sær at gjørt eitt líknandi innslag um føroysk viðurskifti, høvdu vit mett tað sum størri kolonialan ágang enn øll tey kongaligu fornermilsini hjá Heindrikki prinsi tilsamans. So mikið av tjóðskaparligum stoltleika hava vit tó. Tíbetur. Tað er eisini nógv stuttligari at síggja vakrar glansmyndir av smílandi kongaparinum. Og skjótt kemur Ólavsøkan við uppaftur fleiri vøkrum myndum og pussaðum glansi. Hesuferð føroyskum. Tíbetur.

*Í mikudagsblaðnum ummæla skiftandi fólk fjølmiðlarnar.*